IRF – heilt og reint

# Bókhaldari til IRF

IRF søkir við hesum eftir bókhaldara at byrja mikudagin 2. januar 2008, ella skjótast tilber.

Bókhaldarin hevur beinleiðis tilvísing til fíggjarleiðaran.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:

- dagligt bókhalds- og roknskaparарbeiði
- at umsita og avstemma ognara- og skuldarabókhald
- vanligt skrivstovuarbeiði

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og tí er neyðugt, at umsøkjarin hevur kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði. Kunnleiki til Microsoft Navision Axapta er ein fyrimunur.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setur krøv til góð samstarvsevni, menniskjaligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Hevur tú hollar royndir innan bókhaldsyrkið og ástøðiliga útbúgving, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Lønin verður sett eftir avtalu við avvarandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 414243, Erik Lervig.

Skrivlig umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til IRF, Postboks 39, FO-520 Leirvík, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. desember 2007.

**IRF**
Postboks 39
Fo-520 Leirvík

IRF – heilt og reint

# Handverkari til Brennistøðina hjá IRF

IRF søkir við hesum eftir einum handverkara til Brennistøðini á Hagaleiti, at byrja mikudagin 2. januar 2008 ella skjótast til ber.

**Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:**

- Alt vanligt viðlíkahaldsarbeiði á Brennistøðini- og endurnýtsluhøllini á Hagaleiti
- Annað fyrifallandi arbeiði innan IRF

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur útbúgving sum maskinsmiðjur.

Starvið er lønt sambært fastlønarsáttmálanum millum avvarðandi fakfelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Skrivlig umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til IRF, Postboks 39, FO-520 Leirvík, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 28. desember 2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 414243, Jacob Petur Johannesen.

**IRF**
Postboks 39
Fo-520 Leirvík

IRF – heilt og reint

# Bilførari til »Viól«

IRF søkir við hesum eftir einum bilførara til innsavningarbilin "Viól" at byrja mikudagin 2. januar 2008, ella skjótast tilber.

**Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:**

- Innsavnan av húsarhaldsposum og virkisposum v.m. í Sandoynni og á Kalsoynni
- Heintan av burturkasti frá virkjum og bingjuplássum v.m. í meginøkinum.
- Annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF

Hevur tú stóra koyrikortið, ert vanur at koyra lastbil, kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góðan skriviførleika og ordan, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Tann, ið settur verður í starv, kann eisini rokna við øðrum uppgávum innan IRF.

Starvið er lønt sambært fastlønarsáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 414243, Jógvan Júst Olsen.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan fríggjadagin 28. desember 2007.

**IRF**
Postboks 39
Fo-520 Leirvík

IRF hevur 5 serútgjørdar bilar til ruskinnsavning: Roði, Ryski, Rósa, Reyðsmæra og Viól. Arbeiðsumráðið hjá »Viól« verður frá 1. januar 2008 í Kalsoynni, á Sandoynni og í meginøkinum.

## Til sølu



**Traðavegur 30, 435 Streymnes**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Býur** | 435 Streymnes | **Matr. nr.** | 192L |
| **Bústaður** | Traðavegur 30 | **Byggiár** | 2006/2007 |
| **Stødd á grundøki** | 662 m² | **Stødd á húsinum** | 80 m² |

**Veghæddin** Durur, gong, baðirúm við brúsu og wc, køkur og stova íeinum. 2 kømur.
**Loft** Høga reising óinnrættað uml. 50 m²
**Frágreiðing** Góð hugnalig føroysk sniðhús av slagnum Norðseturí besta standi, bygd í 2006/2007, við høgari reising. Húsini eru klødd við timbri, takið aluminium.
Húsini eru nýggj, klár at flyta inn í, hiti í gólvinum í durrinum, baðirúmið hevur vinylgólv við hita, annars eru vøkur eins trægólv í stovu, gong og kømrum.
Húsini liggja sera frítt og friðaligt í natúrvøkrum umhvørvi, gott útsýni oman yvir bygdina, niðan í hagan og út á fjørðin.
**Áhugaði kunnu ringja 214141**



Grón
Tlf 312161
gron@gron.fo
www.gron.fo
Bestu piparnøturnar fáa tit hjá okkum

SEV

# 25 ára starvsdagur



Í dag 13. desember 2007 hevur Kristian Petersen, Skálafjørður starvast í 25 ár hjá elfelagnum SEV sum linjumaður í Eysturoynni.